

www.oljan.fo

**Jan Müller** 08 - 12 - 2011

# Danska oljuframleiðslan minkar næstu árini

Nýggj tøl hjá danska Orkustýrinum siga, at danska olju- og gassframleiðslan fer at minka 30 prosent frá 2011 til 2015. Samstundis sigur stýrið, at framleiðslan í ár verður fimm prosent størri enn upprunaliga mett, tí meiri er fingið burtur úr Halfdan- og Tyra-leiðunum. Metingin hjá Orkustýrinum er, at í 2011 hevur Danmark framleitt 228.000 tunnur um olju um dagin. Tað er sjey prosent minni enn í 2010, men fimm prosent meiri, enn stýrið metti í summar. Mett verður, at gassframleiðslan í ár er 5,6 milliardir rúmmetrar, sum er 21 prosent minni enn í fjør, men samstundis 17 prosent meiri, enn stýrið metti í summar. Hetta seinasta kemst av, at eftirspurningurin var størri í tíðarskeiðinum frá mai til august. Stýrið væntar, at gassframleiðslan fer at minka hetta til 2013, men at hon so fer at veksa aftur til 4,5 milliardir rúmmetrar í 2015.